Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 24

ISSN 0907-905X

Nr. 111 7. september 2009

**Kunngerð
um
spillivatn**

Við heimild í § 17, § 18, stk. 2 og § 72 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, verður ásett:

*Virkisøki og endamál*

**§ 1**. Endamálið við kunngerðini er at tryggja, at spillivatn verður burturleitt á ein skipaðan hátt og at fyribyrgja umhvørvisdálking og heilsuvanda.

**§ 2.** Kunngerðin fevnir um kommunalu ábyrgdina at burturleiða spillivatn frá húsarhaldum, virkjum, festum økjum o.ø. sambært góðkendari spillivatnsætlan

*Allýsingar*

**§ 3.** Í hesi kunngerð skilst við:

1) Fest øki: øki har vatn ikki kann seyra niður, t.d. vegir, tún og asfalterað øki.
2) Regnvatn: Vatn, sum ikki er dálkað.
3) Spillivatn: Vatn, sum á einhvønn hátt er dálkað, og sum ikki kann roknast sum regnvatn.
4) Spillivatnsskipan: Ein spillivatnsskipan umfatar allar rørleiðingar, brunnar og annan útbúnað, sum leiða ella reinsa spillivatn og regnvatn frá savningarstaðnum til útleiðingarstaðið.
5) Spillivatnsætlan: Heildarætlan um, hvussu spilli vatn í kommununi skal fáast burtur sbrt. § 18 í umhvørvisverndarlógini.

*Tíðarfreistir v.m.*

**§ 4.** Kommunustýrið skal gera eina spillivatnsætlan, ið skal fevna um tíðarskeiðið fram til 1. januar 2015.
*Stk. 2.* Ætlanin skal latast Umhvørvisstovuni til góðkenningar innan 1. januar 2011.
*Stk. 3.* Ætlanin skal dagførast triðja hvørt ár og so hvørt, munandi broytingar ella ískoyti verða gjørd til ætlanirnar.
*Stk. 4*. Kommunustýrið hevur ábyrgd av, at spillivatns skipanin er liðug innan 1. jan. 2015, t.v.s. sambært krøvum í § 8-13 í hesi kunngerð.
*Stk. 5.* Umhvørvisstovan kann áleggja kommunustýr unum at upplýsa, hvussu langt áleiðis tey eru komin við spillivatnsætlanunum og -arbeiðinum.

*Spillivatnsætlanir*

**§ 5.** Kommunustýrið skal gera eina spillivatnsætlan, ið saman við korttilfari, inniheldur upplýsingar um verandi og ætlaðar spillivatnsskipanir við atliti at nýgerð, útbygging, umvælingum o.ø., og hvussu arbeiðini verða raðfest.
*Stk. 2.* Korttilfarið skal vera talgilt og sambært veg leiðing frá Umhvørvisstovuni.

**§ 6.** Spillivatnsætlanir skulu innihalda hesar upplýs ingar:

1) lýsing av spillivatnsskipan, íroknað bygnað, tilfar, aldur, reinsing og kloakkeringsøki,
2) slag og nøgd av spillivatni, ið verður ella fer at verða leitt gjøgnum leiðingarnar,
3) útleiðingarstøð og umhvørvið rundanum, t.d. botn- og vatngóðsku og streymviðurskifti,
4) ampar og umhvørvisárin frá skipanini og útleiðingini,
5) eftirlit og røkt av spillivatnsskipanini,
6) eina meting um væntaða menning í kommununi hvat fólkatali og ídnaðartilgongd viðvíkur, og hvønn týdning menningin hevur fyri samansetingina og nøgdina av spillivatni, og fyri umhvørvið, ið spillivatnið verður leitt útí, og
7) eina grundgivna raðfesting av nær ætlaða kloakkeringsarbeiðið verður framt, og nær tað væntandi verður liðugt.
*8)* *Stk. 2.* Fyri verandi spillivatnsskipanir skal spillivatnsætlanin innihalda upplýsingar, sum ásett í punkt 1-6 í stk. 1, og spillivatnsætlanin fyri ætlaðar spillivatnsskipanir skal innihalda upplýsingar, sum ásett í punkt 1-7 í stk. 1.

**§ 7.** Umhvørvisstovan kann áleggja kommunu stýrinum, innan ávísa freist, at lata inn ískoytisupplýsingar, sum eru neyðugar í viðgerðini av spillivatnsætlanunum.

*Spillivatnsskipanir, útleiðingar o.a.*

**§ 8.** Spillivatn skal ikki leiðast út í løkir, áir, veitir, vøtn, strond, fjøru o.tíl.

*Stk. 2.* Einans vatn, ið kann metast sum regnvatn, kann leiðast út í áir, veitir, fjøru o.tíl.
*Stk. 3.* Spillivatn skal leiðast burtur í afturlatnum spillivatnsskipanum.

**§ 9.** Spillivatnsskipanirnar skulu verða gjørdar, so at evni og tilfar í størst møguligan mun verða afturhildin í reinsiverkum, rottangum, úrskiljarum, sandfangum o.ø. fyri at fyribyrgja dálking av umhvørvinum.
*Stk. 2.* Reinsiverk, rottangar, úrskiljarar, sandfang o.a. skulu reinsast og røkjast eftir tørvi.

**§ 10.** Spillivatn skal leiðast út á sjógv, har rákið førir spillivatnið úr landi, og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingar hvørki elva til uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum.
*Stk. 2.* Í serligum førum kunnu aðrar loysnir fyri burturleiðing av spillivatni brúkast, tó einans sambært góðkendari spillivatnsætlan.
*Stk. 3.* Elvir spillivatnsútleiðing til uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skulu bøtandi atgerðir fremjast, so sum økt reinsing.
*Stk. 4.* Miðast skal ímóti at halda talið av útleiðingum á sjógv so lágt sum gjørligt.

**§ 11.** Spillivatnsútleiðingarnar skulu í minsta lagi verða 1 metur undir størstu fjøru.
*Stk. 2.* Spillivatnsútleiðingar, sum av serligum ávum ikki eru ella kunnu vera 1 metur undir størstu fjøru, eru undantiknar kravinum í stk. 1, treytað av, at kanningar hava staðfest, at útleiðingin er sambært § 10.

**§ 12.** Spillivatn skal ikki leiðast út í økjum við privat um ella vinnuligum virksemi, sum t.d. inni í bátahyljum, innan fyri molar, nærhendis neystum, ali økjum og strandaøkjum, har grind verður hildin til, ella nærhendis serligum frítíðarøkjum og økjum, ið antin eru serliga viðkvom ella hava náttúruvísindaligan týdning.
*Stk. 2.* Spillivatn, sum kommunustýri av serligum ávum ynskir at leiða út innan fyri ein mola, eru undantiknar kravinum í stk. 1, treytað av, at kanningar hava staðfest, at útleiðingin er sambært § 10.

**§ 13.** Kommunustýrið skal seta skelti upp við høvuðs útleiðingar við fráboðan um, at spillivatnsútleiðing fer fram á staðnum.

*Eftirlit*

**§ 14.** Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at kommunustýrini lúka krøvini í hesi kunngerð. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.

*Revsing og gildisreglur*

**§ 15.** Kommunustýri, sum brýtur reglurnar í §§ 4-6 og §§ 8-13 í hesi kunngerð ella ikki aktar boð givin við heimild í § 4, stk. 4 og § 7, verður revsað við bót sambært ásetingunum í § 72, stk. 3, sbr. stk. 4 í lógini.

**§ 16.** Kunngerðin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis verða § 19 og § 21, stk. 1 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur settar úr gildi.

Innlendismálaráðið, 7. september 2009

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Rúni Joensen (sign.)

Nr. 112 7. september 2009

# Kunngerð
# um
# gjøld fyri útgávu og endurnýggjan av sjóvinnubrøvum og viðurkenningarprógvum

Við heimild í § 12, stk. 1 í løgtingslóg nr. 63 frá 3. juli 1998 um manning av skipum við seinni broytingum verður ásett:

**§ 1.** Í hesi kunngerð merkir:
1) „Sjóvinnubræv“: Dugnaskaparbræv, sjóvinnubrøv til navigatørar og maskinmenn, tangaskipsprógv, radiovinnubræv, sjóvinnubræv til kokkar og vaktarhaldsprógv.
2) „Viðurkenningarprógv“: Øll útlendsk sjóvinnubrøv, ið skulu hava føroyska átekning.
3) „Uppstiging“: Sjóvinnubræv, sum skal broytast til at geva hægri rættindi.
4) „Endurnýggjan“: Endurnýggjan av sjóvinnubrævi í upp til 6 mánaðir áðrenn sjóvinnubrævið gongur út.

**§ 2.** Skipaeftirlitið krevur inn hesi avgreiðslugjøld fyri sjóvinnubrøv og viðurkenningarprógv:

| | |
|---|---|
| Sjóvinnubrøv | Kr. 250 |
| Endurnýggjan av sjóvinnubrævi | Kr. 250 |
| Viðurkenningarprógv | Kr. 500. |

*Stk. 2.* Gjald verður tó ikki tikið fyri uppstiging, uttan so, at tað er í sambandi við endurnýggjan av sjóvinnubrævi.

**§ 3.** Gjaldið, smb. § 2, skal verða latið Skipaeftirlitinum, áðrenn sjóvinnubræv ella viðurkenningarprógv verður útflýggjað.

*Stk. 2.* Verður umsókn um sjóvinnubræv ikki gingin á møti, verður gjaldið afturrindað umsøkjaranum.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er galdandi fyri umsóknir, sum eru móttiknar aftaná, at kunngerðin fekk gildi.

Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 104 frá 5. desember 2008 um gjøld fyri útgávu og endurnýggjan av sjóvinnubrøvum og viðurkenningarprógvum.

Vinnumálaráðið, 7. september 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

Nr. 113 7. september 2009

**Kunngerð
um
fígging av Grannskoðaraeftirlitinum og kanningar- og dissiplinerskipanini**

Við heimild í § 47, stk. 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grann skoðanarvirkir (grannskoðaralógin), verður ásett:

*Gjøld*

**§ 1.** Til at fíggja raksturin av Grannskoðaraeftirlit inum og kanningar- og dissiplinerskipanini innkrevur Skráseting Føroya eitt árligt gjald frá øllum góðkend um grannskoðarum, sum eru knýttir at einum grann skoðanarvirki pr. 1. januar í innkrevjingarárinum.

*Stk. 2.* Árligu gjøldini fyri hvønn góðkendan grann skoðara, sum er knýttur at einum grannskoðanarvirki, sbr. stk. 1, eru:

1) Grannskoðaraeftirlitið kr. 4.000
2) Dissiplinerskipanin kr. 1.000
3) Kanningarskipanin kr. 2.000.

*Stk. 3.* Til at fíggja raksturin í 2009 verða gjøldini, sbr. § 1, stk. 1 og 2, kravd frá øllum góðkendum grannskoðarum, sum eru knýttir at einum grannskoðanarvirki pr. 1. juli 2009.

*Gildiskoma*

**§ 2.** Kunngerðin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 7. september 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

Nr. 114 7. september 2009

# Kunngerð
# um
# siglingarbøkur

Við heimild í § 71, stk. 2 í løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um sjómenn við seinni broytingum verður ásett:

**§ 1.** Sjómaður, sum mynstrar við skipi, skal hava siglingarbók.
*Stk. 2.* Hevur sjómaður ikki eina siglingarbók, tá mynstrað verður, skal viðkomandi skjótast gjørligt fáa sær eina siglingarbók, og reiðarin ella skiparin skulu síðani føra inn tær neyðugu átekningarnar um tænastuna í siglingarbókina.

**§ 2.** Skiparin skal við mynstring og avmynstring útfylla og undirskriva tær í § 1 nevndu siglingarbøkur.
*Stk. 2.* Siglingarbøkurnar skulu útfyllast tíðiliga. Nøvn á skipum og býum mugu ikki styttast.
*Stk. 3.* Bert tey heiti, sum eru nevnd á manningar skjalinum, mugu nýtast sum starvsheiti.
*Stk. 4.* Skipastødd og maskinorka skulu altíð skrivast í siglingarbókina.
*Stk. 5.* Siglingartíðin skal verða førd sum virkin tænasta umborð og verða uppgjørd í mánaðir og dagar, tá sjófólk mynstrar av.
*Stk. 6.* Um skip hava fleiri styttri mynstringar, kann siglingartíðarskeiðið førast undir einum í siglingar bókini, men tað er bert virkin tænasta umborð, sum skal førast inn í teigin "siglingartíð tilsamans". Í slík um førum skal siglingarbókin tó førast minst 2 ferðir árliga.
*Stk. 7.* Er sjómaður ikki umborð, tá siglt verður, skal dagfestingin fyri fráveruna skrivast í avmynstringar teigin, sum við eini vanligari avmynstring, sama hvør orsøkin er til, at sjómaðurin ikki er umborð. Onnur átekning má ikki nýtast.
*Stk. 8.* Í siglingarbókina ella mynstringarváttanina má eingin viðmerking um háttalag sjómansins í starvinum ella um revsing, hann hevur fingið, verða sett.
*Stk. 9.* Einans tann skipari, ið hevur ført siglingarbók ina, ella Skipaeftirlitið, hava loyvi at gera rættingar í siglingarbókina.

**§ 3.** Skipaeftirlitið útgevur siglingarbøkur.

**§ 4.** Siglingarbók kann bert útflýggjast persóni, sum
1) hevur føroyskan heimarætt og
2) er fyltur 15 ár.
*Stk. 2.* Siglingarbók kann bert útflýggjast persóni undir 18 ár, um viðkomandi vísir fram eitt skrivligt loyvi frá tí, sum hevur foreldramyndugleikan, um at viðkomandi kann fara í starv á sjónum.
*Stk. 3.* Hóast kravið í stk. 1, nr. 1, kann siglingarbók í serligum føri útflýggjast persóni, sum siglir við føroyskt skrásettum skipum, og sum ikki hevur føroyskan heimarætt, t.d. um so er, at heimlandið ikki útgevur siglingarbøkur.

**§ 5.** Umsókn um siglingarbók skal verða skrivað á ser skilt umsóknarblað, sum fæst á Skipaeftirlitinum.
*Stk. 2.* Við umsóknini skal fylgja ein vællíknandi pass mynd av umsøkjaranum.
*Stk. 3.* Umsøkjarin skal vátta sín samleika við at vísa ella innsenda avrit av annaðhvørt passi, koyrikorti ella øðrum líknandi samleikaprógvi við mynd.

**§ 6.** Siglingarbókin kostar 200 kr. Um siglingarbókin skal sendast, krevur Skipaeftirlitið harumframt 60 kr.

**§ 7.** Kunngerðin kemur í gildi 1. oktober 2009. Sam stundis fer úr gildi kunngerð nr. 89 frá 21. september 1989 um útgávu og gjøld fyri siglingarbøkur, hýru avtaluformálar og manningarlistar.

Vinnumálaráðið, 7. september 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

**Kunngerð um broyting í kunngerð um sjóvinnubrøv og útbúgvingarkrøv til sjófólk**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 50 frá 12. mai 1999 um sjóvinnubrøv og útbúgvingarkrøv til sjófólk, sum seinast broytt við kunngerð nr. 102 frá 20. desember 2002 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3 verður orðað soleiðis:
„**§ 3.** Fyri at fáa vaktarhaldsprógv til brúgvatænastu krevst, at umsøkjarin:
   1) hevur heilsuváttan, sum er gild fyri ta tænastu, sum sjóvinnubrævið gevur rætt til,
   2) er fyltur 16 ár, og annaðhvørt
      a) hevur staðið góðkent grundskeið á sjóvinnuskúla og hevur havt 2 mánaða dekstænastu umborð á havfarandi skipum, til støddar 20 bruttotons ella meira, og í hesi tíð, undir eftirliti av vakthavandi brúgvayvirmanni, er upplærdur til allar uppgávur viðvíkjandi brúgvatænastu samsvarandi ásetingunum í kunngerð um vaktarhald á skipum, ella
      b) hevur havt 6 mánaða dekstænastu umborð á havfarandi skipum, til støddar 20 bruttotons ella meiri, og í hesi tíð, undir eftirliti av vakthavandi brúgvayvirmanni, er upplærdur til allar uppgávur viðvíkjandi brúgvatænastu samsvarandi ásetingum í kunngerð um vaktarhald á skipum.“

2) Aftaná § 3 verður sett inn:
„**§ 3 a.** Fyri at fáa vaktarhaldsprógv til maskin tænastu krevst, at umsøkjarin:
   1) hevur heilsuváttan, sum er gild fyri ta tænastu, sum sjóvinnubrævið gevur rætt til,
   2) er fyltur 16 ár, og annaðhvørt
      a) hevur staðið góðkent grundskeið á sjóvinnuskúla og hevur havt 2 mánaða maskintænastu umborð á havfarandi skipum, til støddar 20 bruttotons ella meira, og í hesi tíð, undir eftirliti av vakthavandi maskinyvirmanni, er upplærdur til allar uppgávur viðvíkjandi maskintænastu samsvarandi ásetingunum í kunngerð um vaktarhald á skipum, ella
      b) hevur havt 6 mánaða maskintænastu umborð á havfarandi skipum, til støddar 20 bruttotons ella meiri, og í hesi tíð, undir eftirliti av vakthavandi maskinyvirmanni, er upplærdur til allar uppgávur viðvíkjandi maskintænastu samsvarandi ásetingum í kunngerð um vaktarhald á skipum.“

3) Í § 35, stk. 1 verður orðingin: „ókeypis og“ strikað.

4) Aftaná § 41 verður sett inn:
„**§ 42.** Gild sjóvinnubrøv, útgivin áðrenn 13. mai 1999, skulu fyri at verða verandi í gildi, verða umbýtt við sjóvinnubrøv, útgivin eftir hesi kunngerð, áðrenn 1. juli 2011.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 7. september 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

Nr. 116 7. september 2009

# Kunngerð
# um
# gjald fyri CTD kanningar

Við heimild í § 5, stk. 5 í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið verður ásett:

**§ 1.** Kanningar fyri CTD sjúku (carnitin transporter defekt) eru ókeypis í sjúkrahúsverki Føroya, um so er, at

1) persónur við sjúkueyðkennum er ávístur av lækna til kanningar,
2) skyldfólk – í stígandi ella fallandi linju ella síðu linjuni, so nær sum systkin, børn hjá systkjum, systkinabørn ella trímenningar - hevur fingið staðfest CTD sjúku.

**§ 2.** Persónar, sum ikki eru nevndir í § 1, skulu gjalda fyri kanningar fyri CTD sjúku. *Stk. 2.* Gjaldið er 100 krónur og skal gjaldast áðrenn kanningin verður framd. Gjaldið verður ikki endurrindað, um persón urin seinni verður fevndur av ásetingunum í § 1 ella fær staðfest CTD sjúku.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, 8. september 2009

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

FØROYAPRENT

Hefti 24 • Nr. 111-116 • Útgivið tann 10. sept. 2009